# Zarepta er cool

Tað er stuttligt í Zarepta halda flestu børn, sum hava verið á summarlegu har. Børnini, sum vóru á leguni fyri tey 9 ára gomlu fingu eina serstakliga góða viku, tí veðrið var av tí allarbesta og sólin skein hvønn einasta dag. Sosialurin var á vitjan við myndatólinum. Umframt myndirnar her á síðuni, prenta vit eisini grein um summarlegurnar í Zarepta, sum komandi á hava 40 ár á baki




*Børnini nýtast ikki at keða seg, tí Zarepta hevur nógv ymiskt, sum børnini kunnu stuttleika sær við, eitt nú rennistrong og hoppipútu, sum eru sera væl umtókt millum børnini*





*Og so var tíð at fara í svimjihylin at svala sær á eina løtu. Børnini høvdu úr at gera og stuttleikaðu sær ófört frá eyga fór sundur til tað fór saman*



*Henda fitta diddan var sloppin til Zarepta við mammu síni, sum hjálpti til á leguni. Alt arbeiðið í Zarepta er sjálvboðið, og fleiri foreldur nýta høvið at hjálpa til, tá børn teirra kortini skulu á legu*





*Hóast veðrið var av tí allarbesta, vóru eisini stundir til ítriv innandura. 11 ára gamli Andras úr Klaksvík var hjálpari á leguni, og her er hann í ferð við at laminera eitt bíbliuvers*





*Gentunum dámdi væl at fanga kombikk og hugnaðu sær í tímavís við áarbakkan. Umstøðurnar í Zarepta, bæði innan- og uttandura, mugu sigast at vera av teimum bestu til slíkar legur*

*Nógvur matur skal til, og hesa vikuna var tað Hallgrím Miðberg, bakari í Saltangará, sum var høvuðskokkur*







*Nú dagurin at enda er, og stundir komnar at leggja alt í hond hansara, sum øllum valdar*